gult cyan magenta svart

B36 sendi jokaran til Vágs

Eftir at hava misn‡tt brotsspark, tá ein minuttur var eftir av vanligu leiktí›ini, mátti HB taka til takkar vi› javnleiki, tá B36 í yvirtí›ini sparka›i oddasessin til Vágs

Jákup Mørk

HB-B36 2-2 (2-0)

Tá vanliga leiktí›in í Gundadali var um at fara, var líkt til, at HB framvegis var á gullkós. Dómarin, Lassin Isaksen, hev›i tá júst bríksla› fyri brotssparki, og mótmælini frá illu B36-leikarunum nytta›u líti›, tó dómarin stó› vi› sítt.

Allan Mørkøre tapti tó tvídystin vi› Trónd Vatnhamar, og illa sperdu HB-vi›haldsfólkini vór›u sostatt sett aftur á pínubeinkin, har tey høvdu veri›, sí›ani Jens Kristian Hansen hev›i minka HB lei›sluna ni›ur í eitt mál.

Hjálpardómarin gav tekin um, at tríggir minuttir vór›u lagdir afturat tí›ini, og tá hesir vóru farnir, var HB framvegis á odda. Bæ›i í grannauppger›ini og á stigatalvuni.

Átta sekund seinni var stø›an tó vend á høvdinum. Í seinastu álopsroyndini eydna›iast B36 at javna, og me›an HB leikararnir stó›u sum negldir, fegna›ust teir svørt/hvítu, sum um ta› vóru teir, sum høvdu tiki› eitt avgerandi fet móti meistaraheitinum.

Einasta, sum HB slapp at gera afturat í dystinum, var at geva bóltin upp, á›renn dómarin fyri seinastu fer› blásti í floytuna, og harvi› markera›i endan á einum sonnum drama, sum alt í alt hev›i vart gott og væl hálvan annan tíma.

HB sat á øllum

At talan skuldi gerast um naka› drama, vóru tó eingi tekin um fyrstu tr‡ korterini av dystinum.

HB var snøgt sagt nógv betra li›i› í fyrra hálvleiki, og leingi var líkt til, at eldra havnarfelagi› skuldi vinna vanliga sigurin á lítlabeiggjanum.

Me›an HB frá byrjan av fekk gli› á vanliga positiónsfótbóltin, har mótstø›umenninir renna seg troyttar í kvaka samanspælinum, var heilt ø›rvísi statt hjá B36.

Markeringarnar vóru leysar, og tá teir endiliga fingu fatur á bóltinum, var hann óney›uga skjótt tveittur burtur, solei›is at HB aftur kundi søkja á máli› hjá Trónda Vatnhamri.

Eftir 13 minuttum gav málsókna HB spæli› úrslit. Allan Mørkøre rann frá Clementsen í høgru, og hóast Fró›i mundi halda bóltin fara út av, so vildi Mørkøre ma›urin ta› ø›rvísi. Av baklinjuni fekk hann sent bóltin inn fyri, har Jón Rói vi› fullari fer› kom rennandi og fekk sett pannuna á.

Máli› setti enn meira fer› á HB, og næstu løtuna skola›u álopini oman eftir B36 hálvuni, men so vi› og vi› hæsa›i tr‡sti› tó av. B36 kom eisini alsamt betri vi›, men stórar málmøguleikar fingu teir tó ikki burtur úr hesum.

Størsta orsøkin til hetta var, at ísta›in fyri at royna at koma afturum HB verjuna, var› aloftast roynt vi› diagonalbóltum móti HB verjuni. Hetta var gó›ur kostur hjá høvu›ssterku HB verjuni, i› so at siga ongar trupulleikar hev›i av hesum.

Talan var tó á ongan hátt um nakra B36 yvirvág, og ta› var ikki óuppibori›, at HB skeyt seg upp á 2-0, eftir hálvan tíma. Máli› var tó eitt av teimum heldur løgnu, tí líkt var til, at Hallur Danielsen meir enn hálvkiksa›i, tá hann royndi seg langt innkast og eitt sindur aftur og fram í B36 brotsteiginum. Hvussu var og ikki, so tók skoti› í eitt B36 beint, ha›ani bólturin stikla›i skrúvandi upp um Trónda, sum var› fullkomuliga sn‡ttur av skotinum.

Fagna›urin á B36 leikarunum var ovurstórur, me›an HB leikararnir bert kundu i›ra seg um spiltu møguleikarnar

Mynd: Álvur Haraldsen

B36 hamskift

Fyrri hálvleikur var kanska naka› linligur, leikliga sæ›. Ikki tí, sum nevnt fekk HB í stórum pørtum av dystinum gott gli› á sítt spæl, men ta› skulu tvey gó› li› til, fyri at skapa ein gó›an dyst.

Hvat Piotr Krakowski hev›i sagt leikarunum í hálvleikinum, er ikki gott at vita, men ta› hjálpti í øllum førum.

B36 li›i› var nevnliga hamskift í mun til fyrra hálvleik. Einasta taktiska broytingin var annars, at Mikkjal Thomassen og Jens Kristian Hansen skiftu pláss, so landsli›sskiparin í størri mun tók lut í framrætta›a spælinum.

Hinvegin var broytingin í hugbur›inum stór, tí frá fyrsta bríksli› var nú líkt til, at B36 ætla›i at venda dystinum. Tá HB samstundis tóktist vera mest áhuga í at varveita lei›sluna, fyri sí›ani at dúva upp á avgerandi mótálopi›, sum hev›i givi› grannunum dey›skossin.

Líkt var leingi til, at dysturin antin fór at venda, ella ver›a avgjørdur, men hóast møguleikar í bá›um endum, so fór bólturin ikki inn um málverjarnar.

Nærmast mundi B36 vera, tá Jens Kristian Hansen snitta›i hornasparksinnlegg, men bólturin kíndi undirsí›uni av tvørtrænum, á›renn hann aftur støkk út í spæli›.

Tá fari› var um hálva tíman, var eydnan tó vi› Jens Kristiani. B36 vann fríspark í høgru, tá Hans á Lag var ov seinur eftir Jákup á Borg. Í brestinum fekk Hans onkran snudd, og me›an hann stó› vi› sí›ulinjuna og bí›a›i eftir at sleppa inn, var› frísparki› hjá B36 skoti› innfyri. Vi› handaru stong var Li›skiparin hjá B36 hægstur og st‡rdi bóltin inn um Bár› Johannesen.

Tri›ja dystin á ra› kom aftasti ma›ur hjá B36, Egil Zachariassen, á máltalvuna

Mynd: Álvur Haraldsen

Rokmiki› korter

Seinasta korteri› av dystinum gjørdist sostatt enn meira spennandi, og vóru HB'arnir kroystir undan málinum, vóru teir ta› ikki minni nú.

Álopshugurin hjá B36 gjørdist alsamt størri, men hinvegin gav hetta eisini enn betri rúmd fyri kontraspælinum hjá HB. Fleiri fer› var eisini um reppi›, at hetta gjørdist heilt vandamiki›, men rættuliga leysir gjørdust teir tó ongantí›.

B36 strí›i› tóktist tó vera til fán‡tis, tá dómarin bríksla›i fyri á›urnevnda brotssparki›, men Tróndur megna›i tó at halda lív í vónini, tá hann meistarliga vardi fyri knallhar›a skotinum frá Allani Mørkøre.

Løtu seinni var Tróndur aftur í fokus, tá hann hálvkiksa›i eitt útspark. Florin Miháescu hev›i so at siga opi› mál, men onkursvegna megna›i Tróndur kortini at verja fyri, so talan bert gjørdist um hornaspark.

Seinastu minuttirnar av dystinum, kulminera›i alt. Dómarin leg›i tríggjar minuttir afturat, og hesir vóru farnir, tá B36 vann innkast í vinstru. Bólturin var› tveittur inn í brotsteigin, Magni leg›i út frá til Mikkjal, sum sendi bóltin innfyri, og har kom so aftasti ma›urin hjá B36, Egil Zachariasesen, sum trij›a dystin upp í slag kundi beina bóltin í máli›.

At kalla frøina á B36 leikarunum fyri stóra, er helst ein hin grovasta undirmetingin í ár. Fagna›urin á ásko›araplássunum var alstórur, me›an spælararnir í sínum lagi bólta›u runt á vøllinum.

Av sonnum eitt antiklimaks hjá HB, sum frá 13. fram til 93. minutt hev›i allar trumfarnir á hondini í FM-strí›num, men sum altso í seinastu sekundunum mátti síggja jokaran fara til Vágs.

HB-B36 2-2 (2-0)

1-0: Jón Rói Jacobsen 13.
2-0: Sjálvmál 32.
2-1: Jens Kristian Hansen 68.
2-2: Egil Zachariassen 90.

Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

HB:
Bár›ur Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Ingi Rasmussen – Allan Mørkøre, Rúni Nolsøe, Hallur Danielsen, Vagnur Mohr Mortensen – Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

B36:
Tróndur Vatnhamar – Herbert í Lon Jacobsen, Egil Zachariassen, Fró›i Clementsen – Jan Guttesen, Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen, Jens Kristian Hansen, Karl Leonsson – Jákup á Borg, Magni á Lakjuni

gult cyan magenta svart

Vágbingar vilja vera best

Sigursviljin l‡sti út av øllum spælarunum, tá teir stríddu seg til øll stigini ímóti toftamonnum, sum harvi› mistu FM møguleikan

VB-B68 4-1 (2-0)

Viljin hevur so sera nógv at siga. Ikki minst tá ta› sn‡r seg um fótbólt. Ta› er aftur og aftur undirstrika›, og á Vágs ei›i sunnudagin var hetta enn eina fer› sjón fyri søgn.

FM møguleikin stó› upp á spæl bæ›i hjá heimali›num og gestunum av Toftum, sum høvdu fitt av ásko›arum su›ur vi›. Toftamenn vildu vinna og harvi› var›veita FM møguleikan, men teir taptu, og ta› var fyrst og fremst vinnaraviljin hjá vágbingum, sum var munurin.

B68 hevur vunni› FM tríggjar fer›ir. Viljin var stórur lutur í øllum meistaraskapunum. VB hevur ongantí› vunni› meistaraskapin. Men nú bendir sera nógv á, at ta› fer at eydnast. Ikki minst tí at viljin er so ómetaligur.

Meginpartin av tí›ini vóru vágbingar sera grammir mótvegis toftamonnunum

Mynd: SJH

Ta› var leingi sera tætt

Vágbingar hava gó› fótbóltsevnir. Útlendingarnir á li›num gera fótbóltsevnini uppaftur betur. Ímóti B68 var hetta sjón fyri søgn. Men ta› stó› nógv á, og tí var ta› so sera t‡dningarmiki›, at VB li›i› smoygdi seg í strí›shamin á eitt sindur hála vøllinum (ta› hev›i regna› frammanundan dystinum).

Talan var um nógvar nærdystir. Bæ›i á jør›ini og í luftini. Á B68 mi›vøllinum loysti Bogi Petersen leikbanna›a Fró›a Benjaminsen av. Bogi stó› seg væl.

Á VB mi›vøllinum var Milan Kulic, sum sí›ani summarste›gin hevur sta›i› alt sterkari í myndini, leikbanna›ur. Í hansara sta› spældi bla›ungi Kári í Lágabø, sum frammanundan hevur veri› millum líti› og einki á besta li›num. Hann var ein sannur brandur. Setningurin hjá honum var at ansa eftir landsli›smanninum Øssuri Hansen. Serliga í 1. hálvleiki megna›i ungi ma›urin uppgávuna væl. Eftir ste›gin fóru kreftirnar at ganga undan, og so var› hann skiftur út.

Intensiteturin og spenningurin var alla tí›ina í hæddini. Fer›in var høg, og málmøguleikarnir vóru nógvir. Ta› lá í luftini beinanvegin, at dysturin fór ikki at enda málleysur. Popczynski og Robert vóru so vandamiklir, sum teir hava veri› alt ári›.

Marcello Marcellino og Súni Frí›i Johannesen hava skora› eina rúgvu av málum í ár. Tær sí›stu fer›irnar hevur ta› ikki eydnast so væl, sum ta› hevur gjørt frammanundan. Í Vági høvdu teir ta› trupult. Predrag Zivkovic var alla tí›ina sum ein brandur á Marcello, og Jón Gærdbo hev›i stutt tjó›ur á Súna Frí›a.

Mál og møguleikar

Ta› kann væl vera, at ta› var avgerandi fyri B68, at teir ikki fingu mál, tá teir høvdu fyrsta upplagda málmøguleikan. Marcello var púra leysur, tá hann í málteiginum stúta›i ímóti VB málinum. Bjarni Johansen bjarga›i vi› fótparadu. Eftir dystin skiltu hvørki vágbingar ella toftamenn, at ta› skuldi eydnast málverjanum at fáa fatur á bóltinum, sum tey flestu so at siga sóu í netinum.

Vágbingar vóru í ey›kenda stílinum nærgangandi. Magnus Poulsen í B68 málinum vísti fleiri fer›ir síni gó›u málmansevni – ivaleyst vóru ta› teir bá›ir bestu føroysku málverjarnir í føroysku kappingini, sum vóru á vøllinum. Men í 19. minutti noyddist Magnus Poulsen at fara í meskarnar eftir bóltinum.Robert royndi at spæla Popczynski, men møguleikkin tóktist at vera burtur, tá Arnbjørn Danielsen kom ímillum. Toftama›urin var tó óheppin og glei›, og so takka›i spælandi venjarin fyri møguleikan.

Sí›sta korteri› av fyrra umfarinum tóktist ta› sum um toftamenn fingu betri tak á mi›vøllinum, enn teir høvdu havt. Men í sí›stu løtuni undan ste›ginum fingu teir mønustingin. VB hev›i horna, Tór›ur Holm leg›i innfyri, og so vísti Predag Zivkovic tann viljan, sum ber so ógvuliga langt. Frá brotsteigarmarkinum spenti hann í móti nærra stólpanum, har hann frammanfyri B68 verjuna rann í bóltin og vi› høvdinum sendi inn vi› nærra stólpanum.

B68 hev›i leita› eftir viljanum í ste›ginum. Teir royndu at tr‡sta, og ta› eydna›ist teimum at fáa mál, tá eitt líti› korter var fari›. Kanska var talan um eitt ta› vakrasta máli› á Ei›inum í ár. Eftir honra enda›i bólturin uttanfyri brotsteigin, hagani innskifti Øsur Jacobsen klokkureint smekka›i upp undir krókin.

So spenti Jóannes Jakobsen álopsbogan, og hann brast. Eitt korter resta›i, tá Robert Cieslewicz vi› snildum langskoti økti, og so var ta›, at Popczynski sta›festi sannførandi heimasigurin. Úti vi› hornaflaggi› vann hann nærdyst vi› B68 málverjan, dró eitt sindur út frá og sendi ímillum stólpan og verjumannin, sum royndi at verja fyri.

Fagna›urin í Vági var stórur, og hann var› sum ongantí› á›ur, tá ta› í útvarpinum frættist, at B36 hev›i javna› í Gundadali. Vágbingar settu kósina til hús vi› sannføringini um, at teirra li› evur beina kós ímóti meistaraskapinum!

jh

Og eisini tá talan var um álopsspæl, vóru ta› fyrst og fremst teir á heimali›num, sum tóoktust ey›s‡ndir

Mynd: Áki Bertholdsen

VB-B68 4-1 (2-0)
1-0: Robert Popczynski 19
2-0: Predrag Zivkovic 45
2-1: Øssur Jacobsen 60
3-1: Robert Cieslewicz 75
4-1: Krzystof Popczynski 88

Dómari: Niklas á Lí›arenda (GÍ)

VB:
Bjarni Johansen – Predag Zivkovic, Ey›un Jacobsen, Jón Gærdbo, Mikael í Lágabø – Palli Augustinussen, Tór›ur Holm, Kári í Lágabø, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Krzysztof Popczynski

B68:
Magnus Poulsen – Marlon Jorge, Jan Dam, Arnbjhørn Danielsen, Oleif Joensen, Jákup Djurhuus – Bogi Petersen, Ey›stein Skipanes, Øssur Hansen – Súni Frí›i Johannesen, Marcello Marcellino